VALGREINAR

# Hvat er eftir hjá hjúnum, sum forvinna 408.000 kr??

**Jóanis Nielsen**
*Valevni Fólkafloksins í Vágum*



Hjún, sum tilsamans forvinna 408.000 kr. um ári ella 17.000 kr. um mánaðan, og eiga nýggj hús við eini skuld uppá t.d. 1.020.000 kr. fáa ikki endarnar at røkka saman.

Um vit hugsa okkum eini hjún, sum

Forvinna íalt 34.000 kr. um mánaðin ella 17.000 kr. hvør um mánaðin

Hjúnini eiga 3 børn og búgva í eini kommunu har skattaprosentið er 19%, Barnafrádrátturin er íalt 7.500 kr. pr. barn.

Hjúnini hava bygt hús, sum kosta 1.200.000 kr.

Tey hava eina eginfígging uppá 15%, ella 180.000 kr.

Restin 1.020.000 kr. er lán, 1. veðrættur 700.000 kr. yvir 20 ár og 320.000 kr. til 2. veðrætt yvir 15 ár.

Hjúnini fáa ikki endarnar at røkka saman!

Tí verður neyðugt, ongantíð ov skjótt, at fáa gjørt okkurt munagott, serliga fyri ungfólk, sum skulu seta búgv, tað er jú tey, ið skulu føra samfelag okkara víðari.

**Fíggjarætlan fyri hesi hjún:**

| | |
|---|---|
| Lønarinntøka | kr. 34.000,- |
| - skattur | kr. 13.200,- |
| + barnafrádrátt | kr. 1.875,- |
| Inntøka eftir skatt | kr. 22.675,- |

Fastar útreiðslur:

| | |
|---|---|
| Lán útreiðslur | kr. 6.900,- |
| Olja | kr. 1.000,- |
| Húsatrygging | kr. 350,- |
| Vegskattur | kr. 200,- |
| Sjúkrakassi | kr. 480,- |
| Barnaansing | kr. 3.600,- |
| SEV | kr. 800,- |
| Telefon | kr. 500,- |
| Biltrygging | kr. 140,- |
| Bensin | kr. 600,- |
| ÚF og SVF | kr. 250,- |
| Matur | kr. 7.000,- |
| Fastar útreiðslur íalt | kr. 21.820,- |

Sum sæst omanfyri so eru kr. 855,- pr. mánaða eftir til: Klæði, limagjøld, eftirløn og aðrar óvæntaðar útreiðslur, hjúnini eiga 3 børn (íalt 5 fólk). Netto úrslitið hjá hesum hjúnum við 3 børnum kemur helst at verða negativt.

Hetta kunnu vit ikki bjóða okkara unga fólki.

# Javnsettar tjóðir í sama ríki

**Reimund Langgaard**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



*Venstre opfatter rigsfællesskabet som et fællesskab mellem ligeværdige partnere, mellem tre ligeværdige folk, det færøske, det grønlandske og det danske. Og vi er meget åbne over for en modernisering af hjemmestyreloven, så netop denne ligeværdighed kommer til at fremstå klarere, hvis dette fremføres som et ønske fra færøske side (Orð hjá Anders Fogh Rasmussen í smb við Nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum).*

Tað hevur verið sagt, at nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum er alt ov gott til at verða satt. At tað er nakað, sum danska Stjørnin als ikki kemur at taka undir við.

Tað skuldi hervið verið avsanna.

# Soltið 4-ára skeið fyri Norðoyggjar

**Absalon Matras**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Tá sitandi landstýrið var skipað fyri 4 árum síðan, kundi ein merkja, at fólk aðrarstaðir í landinum misunntu okkum, at vit fingu so stóran part av landstýrismanningini. Vit fingu løgmann, fíggjarmálaráðharran og oljumáláraharran. Afturat komu so sjálvsagt løgtingslimirnir, 4 í tali.

Nú skuldi ein trú, at stórir møguleikar vóru at fáa nøkur mál avgreidd í Norðoyggjum, men ein má ásanna, at lítið er komið burturúr.

Lagt var hart út við at tosa um bygdamenning. Byrjað var við stórum fólkafundi í Fugloy. Men hvat er hent á smábygdunum hesi árini?

Hvussu við farleiðunum millum oyggjarnar: Dúgvan, Barskor og Másin, alt gomul skip, sum ikki nøkta tørvin og ikki eru tíðarhóskandi. Tunnlarnir á Borðoynni eru eisini ótíðarhóskandi og kunnu ikki taka stórar bussar, og tunnlarnir á Kallsoynni eru í ringum standi. Arbeiðið við breiðkan av Norðoyarvegnum er steðgað. Mær er sagt, at eingin peningur er játtaður í ár.

Ein kann spyrja, hví Norðoyggjar hava verið so misrøktar seinasta valskeiði, tá ið vit vita, at landskassin hevur verið á tremur. Eg dugi bert at síggja eina orsøk, og tað er fullveldispolitikkurin. Peningurin, sum skuldi verið nýttur til at loysa nøkur mál í okkara vældømi, stendur á konto í landsbankanum og skal brúkast til at fíggja loysingina.

**Sambandsflokkurin prioriterar øðrvísi.**
Í einum demukratiskum samfelag kunnu flokkar reka tann politikk sum teimum listir, um veljarin tekur undir við teimum. Tí er tað upp til hvønn einstakan veljara at avgera, um førdi politikkurin skal halda fram, ella ein annar, meira framburðsinnaður politikkur, skal førast.

Fullveldisflokkarnir vilja einki hava við Danmark at gera, teir vilja loysa, vit skulu klára okkum uttan tey rættindini, vit eiga í ríkisfelagsskapinum. Hetta hevur hægsta prioritet hjá teimum.

Sambandsflokkurin vil ikki hava loysing, men vil halda fram í ríkisfelagsskapinum og halda fast við tey rættindi, vit eiga í honum. Tí hevur flokkurin nógv størri møguleikar at loysa tey mál ið nevnd eru omanfyri.

Veljarin skal 30. apríl taka støðu til, um Føroyar skulu halda fram á fullveldisleiðini, ella vit skulu ganga sambandsleiðina.

Vel sambandsleiðina!

# Deprimerandi

**Eli Christiansen**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy*



Gjørdi mær tann ómak at hyggja eftir Tinggáttini við Sambandsflokkinum og Lisbeth Petersen. Tað skal sigast beinanvegin, at Lisbeth er ein siðilig og ordilig dama, sum flestu hava virðing fyri.

Tí eri eg keddur av, at eg má siga, at eg var rættiliga deprimeraður eftir at hava sæð sendingina. Alt var bara so trupult. Øll hini høvdu oyðilagt alt. Tú fekst ta fatan, at vit máttu bara pakka saman nú, tí nú var festin slutt. Vit høvdu ikki ráð og kundu ikki roknað við nøkrum serligum komandi tíðina. Men soleiðis hevur Sambandsflokkurin verið, síðani hann varð stovnaður. Um vit so áttu allar verðsins pengar, so var tað ikki gott nokk.

Eg var ein av teimum, sum vónaði, at formansskiftið í Sambandsflokkinum fór at hava við sær, at flokkurin gjørdist meira positivur og sá meira ljóst uppá tað. Flokkurin sigur seg jú vera borgarligan og standa fyri áræði. Men eg kenni ongan borgarligan persón, sum hevur tílíkt mistreysti og so lítið áræði. Ímyndi tykkum, um vit øll vóru soleiðis.

Eg hevði ynskt at komið til ta niðurstøðu, at Sambandsflokkurin var batnaður. Men tað er ikki so lætt at læra gamlan hund at sita. So eg má turrisliga staðfesta, at lítið er hent. Tað hevði ikki verið stórvegis munur á, um Sambandsflokkurin slapp framat í dag í mun til, tá Edmund ráddi fyri borgum. Tó skal sigast, at tær ungu kreftirnar í flokkinum vísa tekin um ein annan hugburð, so vónandi hendir okkurt innan ikki ov nógv ár.

Sambandsflokkurin hevur altíð verið sera afturhaldssinnaður, men tað hevur hann sín grundlógarfesta rætt til. Higartil havi eg bert dugað at sæð eitt gott endamál í hesum. Tað er, at um teir siga, at okkurt ikki ber til, ja, so seta vit onnur okkum tað mál at klára hetta. Tak t.d. bruttotjóðarúrtøkuna, sum er hækkað fleiri miljardir um árið.

Eg má endurtaka, at eg eri keddur av at skula skera tingini soleiðis út í papp. Men tit mugu ikki gloyma, at tað snýr seg um, hvør skal stjórna okkara landi. Her hugsi eg ikki beinleiðis um partapolitikk, men meira um tann hugburð, sum landsins leiðarar hava.

Skal eg siga nakað um Fólkaflokkin, so er hann ikki feilafríur, men vit vilja ásanna okkara feilir og mistøk við dirvi. Vit ásanna, at neyðugt er at føra ein heildarpolitikk, sum byggir á áræði og virkisfýsni. Vælferðarskipanin skal tryggja, at øll hava møguleikar og kunnu hava tað gott óansæð førleika. Tað er ein náttúrulóg, at vit mugu húsast í mun til fíggjarorku. Tí er neyðugt, at vit hava góðar inntøkumøguleikar at reka samfelagið forsvarligt fyri.

# Útróðrarmaðurin

**Karl Olgar Joensen**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum.*



Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi um, hvussu eftirlønarviðursiftini hjá fólkinum skulu skipast, men sitandi samgonga náddi ikki at avgreiða hetta so týdningarmikla mál.

Sambandsflokkurin fer at virka fyri, at hetta málið, sum rakar allar føroyingar, verður loyst í komandi valskeiði.

Tá talan er um eftirløn og trygd hjá útróðrarmonnum, er støðan ikki góð. Fiskimaðurin er tryggjaður í samband við skaða, óarbeiðsføri ella við deyða, meðan útróðramaðurin, sum oftast, er illa fyri, tá tílík óhapp henda.

Tað er avgjørt neyðugt, at teir, sum sum stríðast fyri at skaffa tær inntøkur, sum vit øll liva av, hava tryggar karmar at virka innanfyri.

Útróðrarmaðurin skal hava eina tryggingarskipan, sum tryggjar bæði ímóti skaða, óarbeiðsføri og deyða, og tryggingin skal galda, sjálvt um óhappið hendir á sjónum, ella tá utróðrarmaðurin er heima millum túrar.

Listi B



VALGREINAR

# Kommunuskuldin

**Jaspur Vang**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Landskassi, vinnulív og bankakerv vórðu bjargað av ríkiskassanum, meðan tað ikki hevur verið landspolitiskur vilji til veruliga at loysa trupulleikarnar hjá mest skuldarbundnu kommununum.

Áðrenn búskaparkreppuna fyrst í 1990-unum stóu bæði føroyski landskassin, stórir partar av vinnulívinum, nógvir sethúsaeigarar og nógvar kommunur í landinum fyri alt ov stórum lántøkum.

Hyggja vit at tí, ið síðani er farið fram, kann ein ikki annað enn undrast á, í hvussu stóran mun ríkismyndugleikarnir átóku sær ábyrgd, hvat føroysku kommunuskuldini viðvíkur, og í hvønn mun skiftandi landsstýri hava átikið sær ábyrgd, hvat føroysku kommunuskuldini viðvíkur.

**Landskassaskuldin.**
Tá kreppan tók seg upp, bar danska stjórnin soleiðis í bandi, at uml. 11 mia. av føroyskari skuld vórðu umfíggjaðar, niðurfrystar og strikaðar.

Harumframt hevur góði fiskiskapurin, høgir fiskaprísir, lágt rentustøði og arbeiðsevni og ágrýtni hjá tí einstaka føroyinginum verið orsøkin til, at føroyski landsbúskapurin í dag er so væl fyri, sum hann er.

**Skuldin hjá vinnulívinum.**
Umvegis eitt nú Føroya Banka og ymiskar grunnar varð almennur peningur nýttur til at bjarga stórum pørtum av vinnulívinum, sum síðani við hegni, ágrýtni, stórum útlendskum íløgum og framgongd innan fiskivinnuna hevur fótað sær.

**Kommunuskuldin.**
Hvat kommunuskuldini viðvíkur, kunnu vit staðfesta, at tað higartil ikki hevur verið landspolitiskur vilji til veruliga at bøta um støðuna hjá ringast staddu kommununum.

Nevnast kann, at tá kommunuskuldin seinast varð umløgd, rindaði landskassin einans umleið 25 mió. krónur til endamálið.

Hóast búskaparframgongdina, sum hevur verið seinastu árini, eru kommunur í landinum mong ár framyvir niðurbundnar av skuld í ein sovorðnan mun, at tær ikki megna at halda t.d. vegir og havnir í nøktandi standi, eins og hesar kommunur ikki megna at skapa karmar um økt vinnuligt virksemi og trivnað í økinum annars.

**Niðurstøða.**
Tað er tí lítið skilvísi í at tosa um økismenning, kommunusamanleggingar og uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, sum støðan er í dag. Einum og hvørjum má vera púra greitt, at ongar kommunur við lítlari skuld fara at leggja saman við grannakommunum, sum eru niðurbundnar av skuld, eins og eingin meining er í at leggja uppgávur út til kommunur, ið framman undan ikki megna dagliga raksturin nøktandi.

Í og við at Føroya Landsstýri sum kommunalur eftirlitsmyndugleiki hevði ábyrgdina av alt ov stóru kommunalu lántøkunum, eigur føroyski landskassin tí eisini at vera við til at fáa burtur skuldina hjá ringast staddu kommununum í landinum.

Sostatt eigur spurningurin um kommunuskuldina at verða tikin upp til landspolitiska viðgerð nú búskaparstøðan í landinum er betur enn nakrantíð.

# Javnaðarflokkurin er trygdin fyri framhaldandi ríkisfelagsskapi

**Sverre Midjord**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy*



Eg veit væl, at tað eru trúgvir javnaðarveljarar, sum til hetta valið eru ivingarsamir, tí teir eru ørkymlaðir av fullveldisrúsinum, og tí halda at sambandsleiðin er tann einasti tryggleiki fyri, at vit framhaldandi verða í ríkisfelagsskapinum. Vit vóru í samgongu við sambandsflokkinum, og vildu tá hava eina kanning av heimastýrislógini. Hon var blivin fimti ára gomul, men har var hvørki at høgga ella stinga í, sambandsflokkurin vildi einki, men nú er líka sum vent í holuni, teir hava uppskot um eina skipan, hvør vítt hon er til bata fyri Føroya fólk, tað fari eg at ivast í.

Tann skipan, sum vit hava í okkara ríkisfelagsskapi, hon gevur okkum somu sømdir sum borgarar í hinum partinum av ríkinum. Tað er ein góð skipan, sum vit eiga at varðveita, og tað er ein skipan, sum eg um eg verði valdur fari at verja, tí hon gevur okkum rættindi á so nógvar mátar. Eg gangi ikki við til nakrar yvirtøkur, sum vilja økja um útreiðslurnar hjá okkara samfelag, og sum vilja økja um trupulleikarnar hjá Føroya fólki. Eg verði ikki við til at máa støðið undan teimum møguleikum, sum liggja í teimum góðu viðurskiftunum, sum vit hava havt, og sum nú av fullveldisrúsinum eru heilt farin av lagi.

Mína politisku støðu kennir veljarin, og geva tit mær álitið sum krevst, fari eg at virka fyri, at tey bond, sum binda saman ikki verða loyst mera enn tey eru av verandi samgongu, sum við skerjanini av blokkinum hava gjørt tað fíggjarliga torførari at fáa endarnar at hanga saman. Tær 400 milliónirnar kundu verið brúktar til at betra og bøtt um viðurskiftini hjá okkara eldru, og til at útbygt okkara sjúkrahúsverk og nógv annað, tí tað sum verður latið til Føroyar frá Danmark eru skyldur, sum danski staturin hevur yvir fyri Føroyum. Hesa rokning sum danir eiga at gjalda, hana hava fullveldismenn yvirtikið, hvussu framhaldandi verður er ilt at spáa um. Við teimum ætlanum, sum hava verið frammi, verður tað eisini torført í framtíðini at vita hvussu tað verður við okkara lesandi ungdómi, sum í dag hava rættindi sum ríkisborgarar, men sum, um verandi samgonga heldur fram, koma at hanga í leysari luft. Teir eru byrjaðir at máa støðið undan, so vit aftur koma í ta støðu, at bert tey sum eru múgvandi hava møguleikan at fáa eina útbúgving. Vit brutu niður tann garðin og eg fari at gera alt hvat eg kann, at hann ongantíð kemur aftur, tí tað skulu vera evnini sum skulu tala og ikki pengarnir.

Tað er greitt, at eg og javnaðarflokkurin fara at verja borg og at tryggja betri livikor og møguleikar fyri Føroya fólk. Á tí lokala økinum, sum fyri meg hevur størsta týdningin, fari eg, um álitið verður víst mær, at krevja av einum landsstýri, sum vit verða partar av, at arbeiðsmøguleikar verða skaptir í Suðuroynni, at íbirtingar møguleikarnir verða teir somu í Suðuroy, sum í miðstaðarøkinum. Javnaðarflokkurin fer saman við flokkum, sum tryggja framburð her hjá okkum og somuleiðis tryggja okkara ríkisrættarligu støðu, sum er til gagns fyri alt Føroya fólk.

So mín áheitan á suðuroyingar er, velji Javnaðarflokkin, hann er besta trygdin fyri framburði og trivnaði hjá okkum.

# Rætting til Jørgin Niclasen

**Marjus Dam**
*Løgtingsmaður Sambandsfloksins*



Eg skal geva Jørgini Niclasen rætt, tá hann sigur, at eg havi "túta oyruni full" á Løgtingi og aðrar staðir, fyri at fáa undirsjóvartunnilin bygdan. Tað havi eg sjálvandi gjørt, tí hetta var og er eitt av mínum hjartamálum. Hann er nú veruleiki, og skjótt verður koyrandi. Eg eri sum øll vágafólk, og føroyingar annars, sera glaður um at tunnilin nú kemur, tí hon er ein av fyritreytunum fyri at framburður fer at vera á oynni, og í Føroyum.

Men eg kann ikki góðtaka, tá Jørgin Niclasen kemur fram við beinleiðis ósannindum. Nú er tað soleiðis, at eykajáttanarlógin okt 98 er eitt uppskot við nógvum málum. Nevnda eykajáttanarlóg fyllir t.d. 59 A4 síður.

Til 2.viðgerð kom fram, at fullveldissamgongan royndi at lumpa arvagransking ígjøgnum løgtingið, og avreiða alla arvagransking til felagið DeCode. Mikil orðadráttur kom av hesum. Og undirritaði kundi ikki góðtaka at so var. Tað kundi Sambandsflokkurin heldur ikki. Vit atkvøddu tí ímóti hesum uppskoti til aðru viðgerð. Alt hetta kjak gjørdi tó, at arvagranskingin ikki var avreidd til Ísland.

Til 3. viðgerð atkvøddi tí Marjus Dam saman við øllum Sambandsflokkinum fyri eykajáttanarlógini. Og tí eisini fyri, at vágatunnilinum.

Hví Jørgin Niclasen skal siga, at Vágatingmaðurin Marjus Dam skal vera ímóti Vágatunnlinum er óskiljandi. Eg havi alla tíðina arbeitt sum úlvur í skóg fyri júst hesum máli. Og Sambandsflokkurin hevur allur sum ein tikið undir við málinum. Tíbetur kann tað eisini sigast um aðrar politiskar flokkar. Løgtingið var samt um hetta mál - og tí er tunnilin bygd nú - so einfalt er tað.

Tí fari eg at heita á Jørgin Niclasen um ikki at " skrúva" slíkar søgur saman. Tað er meira enn nokk skrúva av tær, Jørgin.

Niðurstøða: Marjus Dam hevur altíð arbeitt sum úlvur á skóg fyri at tunnilin skuldi byggjast.

Tíverri forðar tað ikki fyri, at loysingin , sum Jørgin Niclasen arbeiðir fyri, hevur gjørt, at onki er hent á flogvøllinum seinastu 4 árini. Her skal ein sterkur Sambandsflokkur til - bæði fyri at forða skaðiligu loysingini - men eisini fyri at loysa flogvallarmálið.

# Miðflokkurin – Miðflokkurin

**Jónfinn Olsen**
*Form. í UfM & valevni Miðfloksins í Suðursteymoy*



*Miðflokkurin* ein øðrvísi flokkur
*Miðflokkurin* ein øðrvísi politikkur
*Miðflokkurin* eitt øðrvísi samfelag
*Miðflokkurin* er ein øðrvísi flokkur í Føroyskum politikki, tí hann byggir á Kristnulívsvirðini við áliti á Gud skaparan.

*Miðflokkurin* hevur ein øðrvísi politikk, tí *Miðflokkurin* er á varðhaldi, tá í á stendur.

*Miðflokkurin* er ein øðrvísi flokkur, við einum øðrvísi politikki, tí vilja vit við politikki *Miðfloksins* fáa eitt øðrvísi samfelag, har fólki vil liva í Gudsótta og nøgdsemi í hjørtunum.

VEL ØðÐVÍSI – VEL MIÐFLOKKIN – VALI ER TÍTT – GOTT VAL.

*Miðflokkurin* tín rødd á Løgtingið.